# MIKUDAGUR Í VESTMANNA

**Tá redaksjónin á Oyggjablaðnum vitjaði í Vestmanna farna mikudag, kundu vit ynskt okkum betri veður. Hóast hesar umstøður fangaðu vit ymiskar umstøður og fólk í ymiskum verki, og verður hetta lýst á hesari síðuni**

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang





## KAMPING

*Í fleiri ár, hava bæði sílaveiðufólk og onnur, gjørt brúk av møguleikanum at gista í einum av kampingvognunum hjá "Fisk og frítíð" omanfyri Vestmanna, á einum øki tey nevna á Lómundaroyri. Hiðani frá er frálíkur møguleiki at gera útferðir í vøkru náttúruna kring Vestmanna*



## LØGREGLAN VITJAR

*Í hesum døgum hava Margretha drotning og Heinrikur prinsur vitjað kring landið, m.a. vitjaðu tey eisini í Vestmanna. Frammanundan hesum er eitt stórt fyrireikingararbeiði gjørt til tess at fyrireika vitjanina so væl sum gjørligt. Eisini løgreglan er inni í myndini. Teir hava koyrt rutuna hjá drotningahjúnunum, og taka her samanum koyringina, beint við Fiskivinnuskúlan í Vestmanna, her drotningin eisini vitjaði*